# Tryggingin í Vági betri umstøður



Tað er Marita Weyhe, arkitektur, sáli, sum hevur teknað tað nýggja, sermerkta húsið hjá Tryggingarfelagnum Føroyum í Vági

Tryggingarfelagið Føroyar hevur fingið eitt nýtt, sermerkt hús at vera í í Vági.

Í tí sambandi bjóðaði tryggingin fríggjadagin viðskiftafólki og annars øllum á móttøku í nýggja húsinum við høvuðsvegin beint í Vági.

Har var ein hópur av fólki komin saman til eitt prát, pinnamat og eitt glas av víni ella djús.

Neil Joensen og Kristina Augustinussen settu dám á við sangi og gittarspæli. Annars syrgdi Pætur Larsen fyri hugnaligum klavertónleiki á móttøkuni og Hannibal og Angela syrgdi fyri, at børnini ikki keddu seg. Tey høvdu eina framførslu í Framtíðini, har børnini eisini fingu ballónir, pitsastykki og ein lítlan pakka í part.

Tað er Marita Weihe, arkitektur, sáli, sum hevur teknað snotiliga og sermerkta húsið mitt í Vági, har Tryggingin nú skal halda til. Annars hevur Jóannes Johannesen hevur staðið fyri arbeiðnum.

Trý fólk arbeiða hjá Tryggingarfelagnum Føroyum í Vági.

Tað er ikki meir enn 25-30 ár síðani, at Tryggingarsamband Føroya, sum tað nevndist tá, læt upp sína fyrstu deild uttanfyri Havnina. Tað var á Skálafirði.

Onnur deildin hjá tryggingini uttanfyri Havnina var tann í Vági, sum læt upp í 1983.

Men so við og við gjørdust Tryggingin greið yvir, at skuldi hin víðka tænastuna í Vági, var neyðugt við nýggjum, nýmótans hølum og tað er úrslitið av tí, sum varð tikið í nýtslu í dag.

– Tá ið vit byggja nýtt hús í Vági er tað sjálvsagt tí at vit trúgvaupp á eina framtíð har suðuri, segði Mortan Poulsen, stjóri í Tryggingini

Í sambandi við at nýggja húsið er tikið í nýtslu, brúkti Tryggingin hetta høvi til at handa VB eina peningagávu upp á 20.000 krónur, sum eru markaðar til ungdómsarbeiðið hjá felagnum.




*Í sambandi við at nýggja húsið er tikið í nýtslu, brúkti Tryggingarfelagið Føroyar hetta høvi til at handa VB eina peningagávu upp á 20.000 krónur, sum eru markaðar til ungdómsarbeiðið hjá felagnum. Her er tað Mannbjørn Tausen fyri VB, hm. sum tekur ímóti kekkinum frá Mortan Poulsen, formanni í Trygingarfelagnum*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 42, 2005
www.kaupthing.fo

# Nokia jaligt, men...

MARKNAÐARRÁK

Heimsins leiðandi framleiðari av fartelefonum, finska Nokia, kunngjørdi roknskapin fyri 3. ársfjórðing í farnu viku. Sum so var roknskapurin góður. Sølan hækkaði 18% til kr. 63 mia. og netto inntøkurnar hækkaðu í kr. 6,6 mia. úr kr 5,1 mia. fyri ári síðani. Hóast inntøkurnar gjørdust 7,5% hægri enn væntað, lækkaði kursurin á Nokia 4,7% í 13,36 kunngerðardagin. Høvuðsorsøkin er, at miðalsøluprísurin á Nokia telefonunum er lækkaður 5,6%, tí at sølan av bíligaru telefonunum, m.a. til latínameriku, er hækkað lutfalsliga. Av tí sølan væntandi fer at økjast meira í latínameriku, fer miðal søluprísurin framhaldandi at vera undir trýsti. Hóast hesi tíðindini vísa frymlarnir hjá Kaupthing, at ein hóskandi kursur á Nokia í løtuni er 16 ella sløk 20% hægri enn nú.

## Væntandi minni av innloysingum

Lánsbrævarenturnar vóru støðugar í farnu viku. Danska 10-ára rentan endaði á 3,20%. Innloysingar av realkredittlánsbrøvum í úrtíð til januar-terminina síggja út til at gerast minni enn til oktobur-termina, m.a. orsakað av, at renturnar eru hækkaðar hendan mánaðin. Tað merkir, at nakrir realar fara at geva góðan vinning.

## Roknskapir hava ikki avirkað

Yvir helmingurin av virkjunum í breiða amerikanska vísitalinum, S&P 500, hava nú kunngjørt roknskapin fyri 3. ársfjórðing. Samanumtikið er myndin tann, at inntøkurnar eru hækkaðar 15% í mun í fjør, men inntøkurnar eru 0,5% lægri enn væntað. Kortini hevur tað í størri mun verið ótti fyri prísvøkstri og rentuhækkingum, ið hevur ávirkað partabrævamarknaðirnar.

## Hesa vikuna

Hesa vikuna verða lyklatøl fyri amerikanska búskapin í andgletti. Brúkaraálit, BTÚ-vøkstur, umframt týdningarmesta prísvakstrartalið verða kunngjørd. Roknskaparkunngerðir enn á breddanum. Týdningarmesta kunngerðin hesa vikuna verður frá Microsoft. Herumframt kunngerða eisini fleiri av stóru oljufeløgunum og nakrir norðurlenskir bankar roknskap. Harumframt er oljuprísurin lækkaður 20% seinastu 7 vikurnar og kann hækka aftur. Sostatt er áhugaverd vika byrjað.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 624,17 | 1,0% | ↑ |
| JPY | 5,39 | -0,6% | ↓ |
| GBP | 1.103,85 | 1,0% | ↑ |
| NOK | 95,74 | 0,3% | ↑ |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,57 | 0,2% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 174,58 | -0,1% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 95,97 | -3,1% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 65,62 | -2,0% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*